# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- So leingi eg eri forseti, fari eg gera mítt til, at okkara falnu hermenn í Irak ikki hava latið lív til fánýtis*

*George W. Bush*

# Hillary eigur at gevast

**Fyrrverandi demokratiska forsetaevnið Bill Richardson mælir Hillary Clinton til at gevast við valstríðnum**



*Tann 22. apríl verður uppstillingarval í Pennsylvania, og Hillary Clinton fór undir valstríð sítt har í gjár*

*Mynd: Polfoto*

Páskavikan royndist ikki væl hjá Hillary Clinton. Fyrst fekk hon at vita, at hon fær ikki umval í Michigan. Hon vann valið har, men demokratiski flokkurin viðurkennir ikki valið, tí tað bleiv framskundað.

Verri varð, tá fyrrverandi demokratiska forsetaevnið Bill Richardson kunngjørdi, at hann styðjar Barrack Obama. Eygleiðarar siga, at hetta var eitt skot fyri bógvin hjá Hillary Clinton, og tað gjørdi ikki støðuna betur, tá fyrrverandi forsetaevnið mælti henni til at gevast við valstríðnum.

- Valdysturin er óheppin. Har eru í heilum persónlig álop, og tað má fáa ein enda, segði Bill Richardson við Fox News um vikuskiftið. Hann er guvernørur í New Mexico og var orkumálaráðharri hjá Bill Clinton. Men hetta seinasta tykist ikki hava bundið hann at Clinton-navninum.

- Demokratarnir eiga at taka seg saman um tann, sum hevur fingið flestar valmenn, og sum hevur vunnið í flestu statum, segði Bill Richardson og sipaði til Barrack Obama.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at tað verður tungt hjá Hillary Clinton at fáa Barrack Obama aftur. Hinvegin er greitt, at heldur ikki Obama megnar at fáa teir neyðugu 2.024 valmenninar, og tí fellur avgerðin ikki fyrr enn á tí endaliga uppstillingarfundinum hjá flokkinum. Partar av demokratiska flokkinum hava skotið upp at halda eyka landsfund í summar og at velja tað endaliga valevnið tá.



*Bill Richardson vil hava Hillary Clinton at gevast við valstríðnum*

*Mynd: Polfoto*

# Umstrídd kópaveiða byrjar aftur

**Um nakrar dagar fara kanadiskir veiðimenn aftur at veiða kóp í St. Lawrence-flógvanum. Mótstøðufólkini hava fyrireikað seg**

Kanadisku myndugleikarnir hava gjørt av at loyva veiðimonnunum at veiða 275.000 kópar í ár. Tað er 5.000 fleiri enn í fjør, men veiðimenninir eru als ikki nøgdir. Teir vilja hava nógv størri kvotu og vísa á, at kanadiski kópastovnurin er mettur til meiri enn fimm milliónir kópar.

Tey, sum eru ímóti kanadisku kópaveiðuni, eru harafturímóti í øðini inn á stjórnina, sum verður løgd undir at loyva tí, sum tey kalla heimsins størsta súgdjóraslátur. Fleiri djóraverndarfelagsskapir hava kravt, at Kanada skal banna kópaveiðini alt fyri eitt.

Summir teirra leggja veiðimenninar undir at drepa nósar við at sláa teir í høvdið, men tað avsanna kanadisku myndugleikarnir.

- Tað er misvísandi, tá felagsskapir almannakunngera myndir av monnum, sum sláa nósa. Tað bleiv bannað fyrst í áttatiárunum, og tað er heldur ikki rætt, tá sagt verður, at skinnið verður skrætt av kópinum, meðan hann er á lívi, sigur Loyola Sullivan, sum er kanadiskur sendiharri í tilfeingismálum.



*Kanadiskir veiðimenn sleppa at veiða 275.000 kópar har suðuri í St. Lawrence-flógvanum*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### 24 ár fyri njósning

Amerikanski verkfrøðingurin Chi Mak, sum er føddur í Kina, varð í gjár dømdur 24 ára fongsul fyri at hava roynt at selja Kina amerikanska vápnatøkni. Tann 67 ára gamli Chi Mak arbeiddi fyrr hjá fyritøkuni Power Paragon, sum ger ymsa tøkni til amerikanska kavbátaflotan. Fyri trimum árum síðani bleiv hann tikin, eftir at agentar hjá amerikonsku samveldisløgregluni FBI høvdu steðgað beiggja hansara og konuni, sum skuldu við einum flogfari til Kina. Í viðføri teirra fann løgreglan tríggjar fløgur við upplýsingum um loyniliga kavbátatøkni.

### Vænta ágang frá ETA

Myndugleikarnir í Spania hava illgruna um, at tað var baskiski loysingarfelagsskapurin ETA, sum beindi fyri einum politikara fyrr í mánaðinum, og myndugleikarnir bera ótta fyri, at drápið kann vera byrjanin til eina røð av atsóknum. Alfredo Perez Rubalbaca, innanríkisráðharri, sigur við útvarpsstøðina Cadena Ser, at spanska fólkið eigur at fyrireika seg til eitt langt tíðarskeið við ágangi frá ETA. Sambært ráðharranum er baskiski felagsskapurin ikki so sterkur nú sum fyrr, men at ETA kortini er førur fyri at søkja at nógvum málum.

### Var við barn

Tann 57 ára gamla bretska kvinnan Susan Tollefsen fekk herfyri tey boð frá lækna sínum, at tað tíverri var hugsandi, at hon hevði fingið krabbamein. Kvinnan gjørdist sum vera man ólukkulig, men her kom sanniliga vend í kenslurnar, tá kanningar avdúkaðu, at hon var við barn. Blaðið Daily Mail skrivar, at Susan Tollefsen og maður hennara hava leingi roynt at fáa eitt barn, men uttan úrslit. Tey vóru tí ovurfegin um boðini. Sambært Daily Mail hevur Susan gingið so leingi við barninum, at tað verður tikið við keisaraskurði í næstu viku.